# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um
# Maritu Weihe
## arkitekt

Nú komu tey tíðindini, sum vit, sum kendu til sjúkuna hjá Maritu, kundu vænta okkum, men tó ikki høvdu roknað við, at Marita var farin frá okkum – høvdu vónað til tað síðsta, at okkurt kundi bjarga henni undan herviligu sjúkuni. Tíðindini eru nú um at verða veruleiki fyri okkum, og vit merkja tómleikan, nú ein av okkara hevur lagt árarnar inn. Tað ber til at siga, at Marita í okkara høpi hoyrdi til tað nýggja ættarliðið av arkitektum, sum kom aftaná Olaf Mortensen síðani Palla Gregoriussen og við Gunnari Hoydal sum eitt intermezzo.

Marita gjørdist bert 56 ára gomul og hevði fyri nøkrum árum síðan stovnað arkitektastovuna Arkitektar 99 saman við Jóhan Laksáfoss, og framtíðin hjá Maritu og virkinum tyktist vera ljós.

Eg havi frá ungum árum vitað um Maritu og kom at kenna hana á arkitektateknistovuni hjá Palla Gregoriussen í 1974, tá eg í summarfrítíðini, meðan eg las til arkitekt, arbeiddi har, og seinni í 1976, tá eg fekk starv hjá Palla og kom at arbeiða saman við henni. Seinni í 1984 kom Marita at starvast á teknistovuni hjá okkum til hon í 1992 fór í annað starv.

Sum menniskja var Marita av skynsamastu fólkum, var altíð við tí góða orðinum og allur hennara atburður var merktur av tolsemi og vælvilja og í framferð var hon hábærslig og ladylike – tað er eyðsæð



at hon hevur fingið gott í beinini heimanífrá.

Tær listarligu gávurnar komu henni til góðar í arbeiðinum, men altíð helt hon seg aftur í lítillátni, hvat tí listarliga viðvíkti, men ongin, sum kom í samband við hana, var í iva um hennara skapandi evnir. Sum samstarvsfelagi var hon íðin og nærløgd og arbeiddi væl saman við øðrum til tess at náa dygdini, hetta sóu vit á teknistovuni og henda hugburð bar hon við sær, tá ið hon gjørdist sjálvstøðug. Dømi um hetta síggja vit í sambandi við umbyggingina av Quillingsgarði, sum er eitt gott dømi um skilagott tilfarsval og góða proportionering í royndini at sambyggja gamalt og nýtt. Eisini er stóra umbyggingin av Tryggingini verd at nevna.

Bert spell, at tað ikki untist Maritu longri tíð sum sjálvstøðug at virka í fakinum.

Eitt skifti var hon formaður í Arkitektafelag Føroya og í hennara formansskeiði mentist felagið munandi og hon gjørdi her eitt stórt arbeiði saman við Gunnleyg Durhuus og øðrum, til tess at fáa felagnum altjóða viðurkenning, so at vit í dag sita javnbjóðis við fundarborðið, tá norðurlendsku feløgini hava stýrisfund. Samskifti millum okkum og hini norðurlendsku feløgini er gott, og hava vit nakrar ferðir verið vertir í Føroyum fyri hesar stýrisfundir, og hevur Marita í sambandi við stýrisfundarnar verið fyrimyndarligur ambassadørur fyri Føroyar bæði her og uttanlands.

Vit eru mong, sum sakna Maritu, og eg hugsi serliga um tykkum Katrin, Heini og Diaba, sum nú hava mist eina kærleiksfulla mammu og konu.

Vit drýpa høvur í samkenslu og lýsa frið yvir minnið um Maritu Weihe.

**Albert Isfeld**

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Oliver Olsen**
**(vanl. nevndur Olivar á Geilini, ætt. úr Svínoy)**
**Klaksvík**

andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi 21. januar, 79 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Betesda týsdagin 25. januar kl. 13. 00.

**Jóhanna**
**Ruth,Fróði og genturnar**

Tey, ið vilja minnast Oliver, kunnu lata Zarepta eina peningagávu.

**Dagurin**

**25. januar. Pálsmessa**. Verður hildin til minnis um umvending Paulusar á leiðini til Damaskus í árinum 36. Á pálsmessu koma súlan og lomvigin at landi. Súludagurin er hátíðardagur í Mykinesi, og í eldri tíðum varð dansað har henda dagin .

*Erlendur biskupur var bispvígdur hendan dagin í 1269.*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, tá ið okkara kæra systir, manssystir, fastir og abbasystir

**Minna Jacobsen**

so brádliga doyði og varð jarðað. Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað. Ein serstøk tøkk til Hera Joensen, prest, fyri fjálgandi orðini við jarðarferðina.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ingrid og Steinbjørn**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu okkum samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Ragnhild Bisp**
**Argir**

andaðist og varð borin til hvíldar.
Tøkk til Bergur D. Joensen, prest, fyri orðini í heiminum og í kirkjuni.
Tøkk til sangarar, tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk til øll tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað. Tøkk til tey, ið hjálptu til við ervinum. Ein serstøk tøkk til heimahjálpararnar, ið vóru um hana til tað seinasta.

*Familjunnar vegna*
**Børnini**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra mamma, vermamma og omma okkara,

**Brynhild Niclasen**
**Hestur**
**fødd Midjord, úr Havn**

andaðist á Lágargarði 21. januar, 75 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Hests kirkju týsdagin 25. januar kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini**

Tey ið ynskja at minnast Brynhild kunnu lata Lágargarði eina peningagávu.